**KØLISKÁP TIL SØLU**
stórt brúkt køliskáp til sølu. Hevur lítið frystirúm.
*Tlf. 255179*

## Innbúgv

**BOXMADRASSA TIL SØLU**
Vegna flyting selji eg góða boxmadrassu, br. 120 cm. Tann fyrsti, sum heint songina, fær hana fyri 450 kr.
*Tlf. 316510/255621*

**SOVIOTTOMAN**
til sølu. Kann takast út til 2 pers. lítið brúkt.
*Tlf. 272469*

**IKEA BARNASONG**
til sølu fyri 500,-
*Tlf. 312551*

**TIL SØLU**
Ein ljósabrún 3 mans sofa og eitt sofaborð úr bók fyri 1700 kr.
*Tlf. 316795*

**ANTIKSSKÁP TIL SØLU**
Gamalt avsyra antikskáp til sølu.
*265027*

**LEÐURHORNASOFA OG SJÓNVARPSBORÐ**
Svørt leður hornasofa keypt í Ide-húsinum 2005 fyri 9000,- kr til sølu fyri uml 6000,- kr .Sjónvarpsborð, træ við glashurðum og hjólum undir til sølu fyri 300 kr
*319030*

**GLASDISKUR**
við hillum bíliga til sølu.
*Tlf. 586243*

**FUTON SOFA**
Lítið brúkt svørt Futon sofa til sølu.
*Tlf. 254866*

**HORNASOFA TIL SØLU**
1/2 ára gomul brún leður hornasofa til sølu fyri 3000,-
*Tlf. 221225*

## Lutaseðlar

**VINNARANUMRINI**
frá lutaseðlunum á eydnuhjólinum 11. november eru hesi:
1) 29518, 2) 42058, 3) 40153, 4) 40155, 5) 29620. Vinningarnir eru allir avheintaðir.
*Thabor, Fuglafjørður*

**LUTASEÐLARNIR**
hjá KFUK í Havn drignir 9. november 2006.
1) 3866. 2) 1660. 3) 4301. 4) 1927. 5) 1669. 6) 1987. 7) 7185. 8) 5220. 9) 1928. 10) 1086. 11) 2224. 12) 7764. 13) 6159. 14) 453. 15) 2173. 16) 455. 17) 3000.
*KFUK, tlf. 311928*

**FRÁ HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG**
Lutaseðlarnir sum trektir vóru 21. august 2006. Hesir vinningar eru ikki avheintaðir. nr. 2) Ferð við Faroe Jet nr. 3322. Nr. 5 Gávukort frá Skemmuni nr. 2730. Nr. 9 Ræstur fiskur nr. 2733. Verða vinningarnir ikki avheintaðir innan 1. desember 2006, fella teir aftur til felagið. Vinningarnir fáast á tlf. 212319.
*Nevndin*

**FRÁ HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG**
Lutaseðlarnir, ið trektir vóru á eydnuhjólinum tann 3.9. er hesin vinningur nr. 44575 ikki avheintaður. Hann fæst á tlf. 212319. Verður vinningurin ikki avheintaður áðrenn 1.12.2006 fellur hann aftur til felagið.
*Nevndin*

## Matur

**SALTGRIND OG SPIK**
30 ltr. íløt/kaggi við saltgrind og spik til sølu.
*Tlf. 586243*

## Pløgg

**ELEGANTUR BRÚÐARKJÓLI**
bert eina ferð brúktur, til sølu ella leigu, str. medium. Vlada tlf. 580559. E-mail vladas@sol.dk
*Tlf. 580559, Vlada*

## Sjavs

**SJAVS**
Sjavskapping verður í Felagshúsinum mikukvøldið kl. 18.45.
*Eldrafelagið Nón*

**SJAVSKAPPING**
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45.
*LÍF*

**SJAVSKAPPING**
verður sunnudagin kl. 16.00.
*NSÍ*

*SJAVSKAPPING*
verður 21. november kl. 19.00. Allir eittarnir í ár eru við í eini størri kapping til jólar um ræst krov og gavukort. Øll vælkomin.
*Tórshøll*

## Súkklur

**MOTORBIKE**
bíliga til sølu. Honda CX 500 v Twin, kr. 6.000,-
*Tlf. 371525*

**MOTORSÚKKLA TIL SØLU**
ein hyosung 650r cc,80 hestar (reyð) sera flott, felgurnar eru reyðar eisini, árg 2006, koyrt 4500 km, til sølu fyri 60.000 kr. Kom og royn hana, ring og hoyr nærri
*tlf 225812*

**TIL SØLU**
Honda x8r-s árg. 02 Skutarin koyrur og hevur plátur og er svartur á liti. Verður seldur vegna plásstrot, og keyp av bili. Áhugað kunnu venda sær til
*telf. 218504*

**SKUTARI TIL SØLU**
Ein vælkoyrandi Derbi Predator til sølu fyri kr 3000,- Handskar og hjálmur fylgir við.
*Tlf. 522288*

**SKUTARI TIL SØLU**
ADLY silvur fox, bíliga til sølu.
*Tlf. 216298*

## Teldur

**SPØL TIL PLAYSTATION 1**
Rainman og onnur spøl til Playstation 1 ynskjast til keyps bíliga.
*Tlf. 226623*

## Tónleikur

**MARSHALL 100 WATT**
guitarforsterkari, lítið brúktur, sær út sum nýggjur. Til sølu fyri einans

3.800 kr.
*Tlf. 510405*

**PLÁTUSPÆLARI**
Thorens plátuspælari 33/45 í góðum standi, bíliga til sølu.
*Tlf. 448310*

**KEYBOARD TIL SØLU**
Keyboard til sølu. Lítið brúkt.
*448375 ella 583477*

## Út- & Sjónvarp

**28´ SJÓNVARP**
1/2 ára gamalt JVC sjónvarp til sølu fyri 2000,-
*Tlf. 221225*

**TELEVARPSKASSI**
til sølu fyri kr. 500,-
*Tlf. 522288*

**PARABOLSKERMUR**
og móttakari til sølu fyri 1000 kr.
*Tlf. 313183*

## Ymiskt

**ÁRLIGA JÓLASØLAN**
á Vistarheiminum í Tórfinsgøtu 8 verður týsdagin 21. nov., miku-, hós-, og fríggjadagin 24. nov. Allar dagar frá kl. 13.00-17.00. Kaffi, te og køkur verða at fáa. Úrvælið er gott og fjølbroytt. Øll eru vælkomin.

**HEIM TIL JÓLA VIÐ NORRØNU?**
Er tað onkur, sum kemur heim til jóla úr Danmark við Norrønu og kann hava ein persónbil við? Vinarligast setið tykkum í sambandi við okkum og hoyri nærri á tlf. 373850 ella teldupost: robert-t@kallnet.fo
*Tlf. 373850*

**FOTOTÓL**
Digitalt Fototól, Fujifilm A370 5.2M-pixels, 3xOptical - og 4xDigital zoom, 256Mb xD picture card, battarí og ladari, USB kábil. 1500.-kr.
*Tlf. 314587*

**JÓLASTOVA**
Y. M. Barnaringurin á Toftum hevur útsølu av lutum, sum børnini sjálvi hava virkað og burturluting, til frama fyri Útimissión, leygardagin 18. nov. kl. 15.00. Vit taka við tøkk ímóti lutum.

**ÚTHURÐ TIL SØLU**
Svedoor úthurð við karmi, høgra inn, hvíttlakerað, útv. karmmát cm. 81x200.
*Tlf. 228582*

**JÓLASØLA Í VÁGI**
Tórsdagin 7. des. og fríggjadagin 8. desember verður í Billiardhúsinum søla av ymiskari heimaframleiðslu, nógv ymisk søluborð, ein skúlaklassi hevur kafé og mattombola, báðar dagar er opið frá kl. 13.00-18.30.
*Fyrireikararnir*

**7 HVÍTAR FINÉR**
innandura hurðar í ymiskum støddum við karmi, til sølu fyri 2.000,- kr.
*Tlf. 214166*

**SPERLA OG RASTKJØTAVEISLA**
Árliga speril og ræstkjøtaveitslan hjá Vágs bridge og billardfelag verður fyri limum við maka, í húsinum fríggjadagin tann 24/11-kl. 19. Nýggir limir kunnu tegna seg, listin liggur frammi frá 17/11 Vágs bridge og billardfelag.

**KLÆDNAINNSAVNAN**
Leygardagin 18. novembur kl. 11.00-15.00. **Gevi gætur at pakka soleiðis:** Góð, rein og heil klæði í sekkir á 12 kg. **- Einki annað má koyrast í, sekkirnir fara ókannaðir til Dansk Røde Kors.** Reint bummullstilfar - merkt **»til klútar«** alt annað - smálutir, skógvar, serliga spennandi klæði o.a. - skal merkjast **»til loppumarknað«**. Latast kann inn við allar keypssamtøkurnar og í Reyða Krossi, inngongd úr Vágsbotni.
*Reyði Krossur/Føroya Keypssamtøka*

i Sosialurin


Vegna vaksandi virksemi og víðkað virkisøki søkja vit eftir

# verkfrøðingi/byggifrøðingi

**Í samstarvi við leiðsluna og onnur í fyrisitingini fevnir starvið í høvuðsheitum um:**

- Tilboðsrokning
- Fyrireiking av byggimálum
- Projektleiðsla
- Avseting og uppmáting

Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, sum geva góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum toymi av teknikarum og formonnum.

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði og/ella byggitøkni, og helst nakað av royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Góður kunnleiki til edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar til tílík arbeiðir, er ein treyt.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu partanna millum.

Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

*P/F Articon*
*Postboks 3109*
*110 Tórshavn*

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 24. novembur 2006.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jón Danielsen, tel. 350 700 ella 210 683.

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

Articon-samtakið, sum eisini fevnir um Byggi-Service, er ein byggifyritøka í støðugari menning. Feløgini takast við alt slag av byggi- og annlegsarbeiðum - bæði størri og smærri. Somuleiðis gera vit eisini alt slag av apteringsarbeiðum umborð á bátum og skipum. Tað starvast í dag umleið 100 fólk hjá feløgunum báðum, býtt millum arbeiðsfólk, handverkarar, maskin- og lastvogns-førarar, formenn, byggi- og verkfrøðingar og skrivstovufólk. Feløgini hava skrivstovu í Tórshavn.





